

*Nýggi Citroën C4 er ein spennandi bilur við nógvari nýhugsan*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Luktspreiðari við fleiri ymiskum luktum er innbygdur í ventilatiónsskipanina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Citroën C4:

# Koyrir væl og luktar væl

**Nýggi Citroën C4 er ein spennandi bilur við nógvari nýhugsan, sum t. d. innbygdum luktspreiðara, og rattnavið flytur seg ikki, tá bilførarin snarar rattinum**

BILAR
*MagnusGunnarsson*
*maggi@sosialurin*

Citroën C4 fæst bæði við fimm hurðum og sum coupé við trimum hurðum.

Sum nakað heilt nýtt er ein luktspreiðari við fleiri ymiskum luktum innbygdur í ventilatiónsskipanina. Reguleringin av luktinum er trinleys og kann eisini koyrast heilt fyri.

Rattið er heilt annarleiðis, enn vit eru von við. Sjálv miðjan í rattinum (rattnavið), við Citroën búmerkinum, flytur seg ikki, men bert rattkransurin flytur seg, tá bilførarin snarar rattinum. C4 er lættur at koyra, og allar funktiónir á instrumentborðinum sita ergonomiskt rætt. Servostýringin er elektrohydraulisk og tillagar seg ferðina.

Øll instrumentini uttan snúningsteljarin eru í miðjuni á instrumentborðinum, og ljósið í instrumentunum tillagar seg ljósviðurskiftunum – um tað t.d. er myrkt, sterk sól o.s.fr.

C4 fæst við fimm ymiskum bensinmotorum og trimum dieselmotorum. Bensinmotorarnir eru hesir: 1,4 litur við 90 hk, 1,6 litur við 110 hk, 2,0 við 138 hk, 2,0 við 143 hk, og 2,0 litur við 180 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,6 litur HDi við 92 hk, 1,6 litur HDi við 110 hk, og 2,0 litur HDi við 138 hk.

Bilurin fekk toppkarakter í EuroNCAP krasjtestunum, eisini fyri at vera »fótgangaravinarligur«, um hann t.d. skuldi koyrt á ein fótgangara.

Býligasti Citroën C4 1,4 Advance bensin við 90 hk kostar kr. 195.000, og prísirnir á dieselútgávunum byrja við kr. 212.000,- fyri ein 1,6 litur HDI við 92 hk.

Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum við Hoyvíksvegin.

Ivan Johansen Bilar, Dinitrol:

## SJÁLDAN OV SEINT - MEN ONGANTÍÐ OV TÍÐLIGA







Í morgunsendingini hjá Útvarpi Føroya 21. apríl 2005 var evnið "bilar, vegsalt og rustviðgerð" viðgjørt. Í hesi sending kom fram at føroyska veðurlagið fer illa við bilunum sum koyra á vegnum, serliga um veturin tá undirvognurin verður sera skitin og vegirnir ofta verða saltaðir, og skitturin upptekur vegsaltið. Um bilurin ikki verður reinsaður og rustviðgjørdur, fær saltið frið at arbeiða og tera undirvognin. Samlingar eru wserliga útsettar.

**Alt verður gjørt eftir forskrifunum**
Til hvørt einstakt bilmodell eru kort við ágreiniligum upplýsingum um konstruktiónina á bilinum, og hvørji amboð skulu brúkast. Alt verður gjørt eftir forskriftunum.

**Fakta um Dinitrol rustviðgerð í Føroyum:**
- Dinitrol rustviðgerð er góðkend av Dansk Teknologisk Institut.
- Dinitrol rustviðgerðin fær besta skotsmál frá Dansk Teknologisk Institut.
- Dinitrol rustviðgerðin verður eftirkannað (stakroyndir) av VKO-R (Værksteds Kontrol Ordning vedrørende Rustbeskyttelse).
- Dinitrol rustviðgerð verður tilmæld av FDM.
- Dinitrol rustviðgerðin leingir munandi um livitíðina hjá bilinum.

DANAK
DNV

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin 341800